# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Tá Bill rætti bakara fyri smið…

Í farni viku vóru vit vitni til ta margháttligu hending, at ein løgtingsmaður meldaði Rás2 og tvær ungar kvinnur, sum gera sendingar har, fyri at reklamera fyri hassji.

Varafútin segði við Sosialin í gjár, at tey mugu viðgera eina slíka kæru. Men hann visti ikki, hvørja lógargrein, Rás2 møguliga skal hava brotið, so ivasamt er, um hetta í heila tikið verður eitt mál, ella um fútin vísir tað frá sær.

Sjálvandi er tað ikki reklama, tá Rás2 tekur slíkt evni upp – talan er helst um eina roynd hjá einum løgtingsmanninum at skora sær nøkur bílig poeng og umrøðu í nakrar dagar.

Vit halda kortini, at løgtingsmaðurin rættir bakara fyri smið. Tí hvør hevur betur møguleika at gera nakað við rúsevnismálið, enn júst okkara politikarar? Vit kunnu eisini spyrja Bill Justinussen, hvat hann hevur gjørt fyri at bøta um hesi viðurskifti.

Seinasta góða mánaðin hava Sosialurin og Rás2 í fleiri greinum og sendingum varpað ljós á rúsevnismisnýtslu. Hetta er sjálvandi fyri at seta fokus á hetta brek í okkara samfelag, sum myndugleikarnir ikki megna at rætta. Tá Bill Justinsussen meldaði Rás2 ringdi stjórin á útvarpsstøðini og spurdi tingmannin, hvat hann sjálvur sum tingmaður hevði gjørt hetta sama tíðarskeiðið til tess at bøta um rúsevnismisnýtsluna.

Svarið var einfalt, tí hann hevði als einki gjørt. Ikki rørt hond frá síðu.

Men tað hevur hann nú, tí hann hevur meldað tvær ungar kvinnur, sum hava skrivað um evnið í Sosialinum og gjørt slóðbrótandi útvarpssendingar til ungfólk um málið á Rás2. Hann hevur eisini reist somu ákæru í løgtinginum – og yvir fyri mentamálaráðharranum reist iva, um sendiloyvi av hesi sending skal takast frá Rás2.

Hetta er so langt úti av proportiónum, at vit hava als ikki orð fyri slíkari undanstøkking.

Bill Justinussen hevur allar møguleikar at reisa mál í løgtinginum. Hann kundi t. d. spurt avvarðandi landsstýrismann, hví tað er loyvt at innflyta hassjfræ til Føroya, hann kundi stuðlað fráhaldsfeløgum, sum sjálvboðin gera stórt hjálpararbeiði – ja, hann átti heilt einfalt bara at givið hesum trupulleika ans.

Hygg um teg sjálvan næstu ferð, harra Bill Justinussen!

**Sosialurin**

## Onkur má siga stopp

HENRIK OLD



Tey sum gjøgnum árini hava upplivað ágangin frá norðmonnum í samband við fiskivinnusamráðingar millum Føroyar og Noreg undrast helst ikki yvir seinasta álopið úr Noreg á føroyska fiskivinnu.

Men nú má vera nokk.Tá Noreg tveitur okkum 5.000 tons av 36.000 tonsum av makreli og samtíðis sigur, at taka tit ikki við hesum so fáa tit onki, tá má botnurin vera náddur.

Landsstýrismaðurin hevur onki val, tað vita norðmenn, allir flakatrolararnir eru í klemmuni og eru riknir burtur av bestu fiskileið.

Tað at Føroyar og Noreg (sum eitt felags trekk ímóti ES) avtala at áseta sær eina eyka kvotu av makreli upp á sløk 36.000 tons er so eitt, men tá so býtast skal, so siga norðmenn, at tit fáa 5.000 tons, restin er okkara, tá ber ikki til meir. Gongur hettar, so verða teir nógv grovarði næstu ferð.

Norski kapitalurin og norskir kvotabarónar hava seinastu nógvu árini yvirtikið meira og meira norska partin av fiskivinnu samráðingunum millum Noreg og Føroyar, samtíðis sum politiski myndugleikin í Noreg hevur minni og minni at skula sagt. Havi sjálvur fleiri ferðir verði við til hesar samráðingar undir leiðslu av Atla Dam.

**Nógv harligari til verka**

Nú eiga allir myndugleikar í Føroyum sum hava høvið til tess at gera vart við seg yvirfyri norðmonnum. Fyrst Løgmaður, síðan landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, eisini føroysku limirnir í Norðurlandaráðnum eiga á næsta fundi at fáa hesa norsku herferðina móti føroyingum uppí orðaskiftið í norðurlandaráðnum. Hettar er roynt fyrr og hava norðmenn verði rættuliga kroystir, tá onnur norðurlond hava hoyrt um skiftandi norsku framferðina ímóti føroyskum fiskimonnum og føroyingum sum heild. Hugsa sær til 85 prosent til norðmenn 15 til okkum.

Fyri at fáa eina eyka toskakvotu í Barentshavinum hava norðmenn ásett sær sjálvum eina eyka (kystkvotu) av toski. Ber onki annað til hjá okkum, so er at áseta eina eyka strandakvotu av makreli við Føroyar, og endiliga minnast til at fiska hana. Lige for lige når venskab skal holdes.

## Viðmerking í samband við skrivingina í seinastuni um KODA og føroysku miðlarnar

ATLI K. PETERSEN
formaður, Felagið Føroysk Tónaskøld



Felagið Føroysk Tónaskøld (FFT) fer undir ongum umstøðum at taka undir við royndum at undirgrava upphavsrættin hjá tónaskøldunum, uttan mun til hvat slag av tónleiki talan er um.

Vit átala harðliga, at núverandi og fyrrverandi nevndarlimir í FFT alment verða lagdir undir at hava misnýtt sínar nevndarsessir til egnan fyrimun.

FFT hevur aðalfund einaferð um árið. Tað er har, ið limir FFT kunnu gera sína ávirkan galdandi.

Bíðað hevur verið eftir nýggju føroysku upphavsrættslógini tey seinastu 10-15 árini. Fyrr enn hon er samtykt, kemur ikki upp á tal at tosa um annan leist enn tann, vit nýta í løtuni t. v.s. at KODA umsitir okkara upphavsrætt.

Tó talar alt fyri, at vit eisini framhaldandi fara at velja at verða knýtt at einum størri felagsskapi.

Tað krevur nevniliga somikið stóra umsiting at taka sær av upphavsrættindunum hjá tónaskøldunum, at til dømis íslendski felagsskapurin STEF hevur gjørt avtalu við svenska STIM, og SACEM í Luxembourg hevur gjørt avtalu við franska SDRM um at umsita teirra rættindi.

Viðvíkjandi uppáhaldinum um, at ávíst slag av tónleiki fær bróðurpartin av tí, sum FFT hevur at arbeiða við, skal her upplýsast, at í 2008 vóru pengarnir býttir soleiðis: 1/5 fór til fløgustuðul, harav nógv tann størsti parturin til populertónleikin. 2/5 fóru til konsertir innan so gott sum øll sløg av tónleiki. 1/5 fór til konsertferðir og 1/5 partiturkomponistar.

Tað er ikki fyrr enn føroyingar spæla 100% føroyskan tónleik og 0% útlendskan tónleik, at vit kunnu tosa um, at vit skulu hava tað sama aftur til Føroyar, sum vit gjalda til KODA.

KODA umsitir jú eisini rættindini hjá Paul McCartney, Sting og Beonce í Føroyum. Hesi mætu listafólk vilja helst fegin hava sín part av tí, sum tey hava rætt til, tá teirra tónleikur verður framførdur í Føroyum. Á sama hátt er væntandi, at Teitur, Eivør og Týr vilja hava sín part av tí, tey hava rætt til, tá teirra tónleikur verður spældur í miðlunum í øðrum londum.

Í løtuni eru yvir 400 skrásettir KODA limir búsitandi í Føroyum. Teir hava skrivliga góðtikið, at KODA umsitir teirra upphavsrættindi. Hóast KODA umsitingin er stór eftir føroyskum málistokki, er hon, um ikki tann minsta, so í millum tær minstu í heiminum fyri ein felagsskap av hesum slag. Tað vil siga, at ein lutfalsliga sera lítil partur av peninginum sum KODA skal fordeila til tónaskøldini fer til umsiting.

Um føroysku miðlarnir virða tað arbeiði, ið okkara tónaskøld og sangrithøvundar gera, eiga teir uttan mun til um talan er um rock, pop, fólkatónleik, R&B, jazz, gospel, partiturtónleik e.a., at yvirhalda avtaluna, teir hava ella eiga at hava við KODA. Um so er at teir ikki eru nøgdir við treytirnar, so er at samráðast við KODA fyri at finna eina loysn sum báðir partar kunnu liva við.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.